# BILAR

SAMBAND
MAGGI GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800



## Tryggvi trúgvur Saab kundi

**Týsdagin 27. juni keypti Tryggvi i Bech í Havn ein nýggjan Saab 9-3 frá Auto service. Hetta er tann fimti Saab, hann hevur keypt í 30 ár. Tann fyrsta keypti hann í 1976.**

BILASØLA

Á myndini gevur John Vilhelm, sølumaður hjá Auto Service, Trygva blómur í sambandi við handanina av nýggja bilinum, sum er ein Saab 9-3 TDIs Sport Sedan við 150 hk torbo dieselmotori. Motorurin er sera umhvørvisvinarligur við nýggjasta slagi av partikkulfiltrinum.

John Vilhelm, sum hevur selt Saab í næstan 30 ár, sigur, at Saab-kundar sum heild eru sera trúgvir.

# Bilrøkt við nýggjari tænastu

**Sp/f Bilrøkt, ið hevur spesialiserað seg í polera, reinsa og lakkforsegla bilar og at selja brúktar bilar, bjóðar seg nú fram við ein nýggjari hjálpar- og flutningstænastu**

BILRØKT

Fyritøkan hjá Jákupi á Borg, Sp/f Bilrøkt, sum hevur hildið til á Varðagøtu, er nú flutt í onnur hølir á horninum Dalavegur/Pedda v. Steingøta.

Í hesum sambandi bjóðar fyritøkan seg fram við eini hjálpar- og flutningstænastu við einum bili, sum er gjørdur til endamálið. Talan er um ein 6 tons Nissan ECO – T 100 lastvogn, sum er umbygdur til ein hjálpar- og flutningsbil.

Jákup á Borg sigur, at endamálið er at kunna veita eina góða tænastu til tey sum hava brúk fyri einum slíkum bili til ymiskan flutningstørv.




*6 tons Nissan 6 tons Nissan ECO – T 100 lastvogn hjálpar- og flutningsbil hjá Sp/f Bilrøkt uttan fyri hølini hjá fyritøkuni við Dalavegin*

Tað tað kann vera til bilar sum er uppstøðgaður og skulu á verkstað, ella bilar sum bert skulu flytast úr einum staði í annað, sum t.d. nýggir bilar sum skulu koyrast frá havnalagnum og til bilhandlaran.

Hjálpar- og flutningsbilurin klára allar vanligar persón- og vørubilar, eins og trukkar og onnur arbeiðstól. Vit hava skipað tað soleiðis, at fólk kunnu ringja eftir hjálpar- og flutningsbilinum alt samdøgrið á telefonin 588881, sigur Jákup á Borg frá Sp/f Bilrøkt.

Incra Sp/f:

# Shiny Wheels er ein succes

**Eg gleiðst yvir, at Shiny Wheels var so væl móttikið, bæði av føroysku bileigarunum og uttanlands, eisini millum hýruvognsførarar, sigur Regin Dalsgaard frá Incra Sp/f, sum fyri eini tíð síðan kom á marknaðin við einum føroyskt framleiddum vaskievni til bilfelgur**

SHINY WHEELS

Tað er ikki á hvørjum degi at nýtt føroyskt vaskievni kemur á marknaðin. Talan er um Shiny Wheels, ið er framleitt til at reinsa felgurnar á bilinum við. Tað er fyritøkan Incra Sp/f v. Regin W. Dalsgaard, ið framleiðir vøruna.

Nú ein tíð er fráliðin, síðan Shiny Wheels kom á marknaðin, hava við spurt Regin Dalsgaard frá Incra Sp/f um, hvussu reinsievnið varð móttikið. Regin sigur, at endamálið við Shiny Wheels var at framleiða eitt vaskievni, sum var lætt og ómakaleyst at fáast við, og tað eydnaðist sera væl. Hann hevur nýliga verið í Danmark og í Íslandi og marknaðarført Shiny Wheels við sera góðum úrsliti, serliga í Íslandi, har hann fekk høvi at samanbera produktið við onnur felgureins, sum eru á marknaðinum. Shiny Wheels var tað vaskievni sum royndist best, tí hevur fyritøkan nú fingið nakrar stórar sáttmálar í lag har yviri.

Vanliga eru felgurnar krókutar og ringar at fáa reinar, og eg meti so avgjørt at tørvur hevur verið á einum slíkum vaskievni, sum virkar skjótt og er effektivt og umhvørvisvinarligt. Eg gleiðst yvir, at evnið er so væl móttikið, bæði í Føroyum og uttanlands, eisini millum hýruvognsførarar sum koyra nógv, sigur Regin Dalsgaard frá Incra. Shiny Wheels fæst nú eisini í so at siga øllum matvøruhandlum í Føroyum.



*Regin W. Dalsgaard frá Incra Sp/f við einum platti av Shiny Wheels, sum skal til Íslands*

*Mynd: Jens Kristian Vang*